## Smugla fisk og krabba

Tað er fyri tað mesta sigarettir og øl, sum tollararnir í Norðurnoregi leggja hald á, og í so máta var árið í fjør metár, skrivar Nordlys. Men eitt annað sermerkt við hagtølunum fyri árið er, at har eru millum annað 15,5 tons av kongakrabba og gott og væl eitt tons av fiski. Krabban funnu tollararnir umborð á einum útlendskum skipi í Kirkenes. Fiskin tóku tollararnir frá útlendskum ferðamonnum, sum ikki hava loyvi til at taka meiri enn 15 kilo við sær.



## Finnland upp í NATO

Fyrrverandi finski verjumálaráðharrin Jan-Erik Enestam skrivar í einari blaðgrein, at Finnland eigur at fara upp í verjusamgonguna NATO. Hann vísir á, at við at fara upp í NATO sleppur finska verjan undan stórum og sera kostnaðarmiklum broytingum. Jan-Erik Enestam er ikki heilt samdur við teimum, sum siga, at eingin hernaðarlig hóttan er longur. Í øllum førum er ov seint at biðja um limaskap í NATO, tá hóttanin kemur, skrivar hann.

# Fríur innflutningur av narkotika til Føroya

**- Heldur hendan gongdin fram, kann fríur innflutningur til Føroyar av narkotika gerast tann beiski veruleiki, sigur Meinhard Gaardlykke, formaðurin felagnum fyri tænastumenn**

EFTIRLIT
*Áki Bertholdsen*
*aki@sosialurin.fo*



*Nú fer tað eisini at bera til hjá tollarum at fara í verkfall og so fer alt landið at liggja púra opið fyri ólógligum innflutningi av narkotika og øllum øðrum smugglaravørum, sigur formaðurin Meinhard Gaardlykke, formaður í Tænastumannafelagnum*

Fríur innflutningur av narkotika til Føroyar!

Fyri tey allarflestu ljóðar hetta sum ein ræðumynd av teimum heilt stóru.

Men hetta kann skjótt gerast tann beiski veruleiki í Føroyum, staðfestir Meinhard Gaardlykke, formaður í tænastumannafelagnum.

Hann sigur, at tað nýggja rákið, sum hevur tikið seg upp í almenna starvspolitikkinum, er ógvuliga vandamikið.

- Endamálið við almenna starvsfólkapolitikkinum er, at tað almenna fyri alt í verðini vil sleppa av við tann starvsbólkin, sum eitur tænastumenn.

Mett verður, at tænastumannaskipanin er alt ov stirvin og tí vil tað almenna sleppa av við tænastumenninar.

Men ein fyrimunur við tænastumonnum er, at teir hava ikki loyvi at fara í verkfall.

Men hendan tráðanin eftir at sleppa av við alt, sum eitur tænastumenn, hevur nú eisini rakt tolleftirlitið.

- Tollvaldið hevur akkurát nú søkt eftir tollarum, men tað stendur í lýsingini, at teir skulu ikki vera tænastumenn, men starvsmenn, sigur Meinhard Gaardlykke.

- Tað merkir, at stingur ósemja seg upp við arbeiðsgevaran, kunnu teir rætt og slætt fara í verkfall.

Hann sigur, at fyrr í ár varð eisini søkt eftir førara til ein hassjhund, men eisini hann skuldi vera starvsmaður.

Kortini varð lagt afturat, at søkti tænastumaður starvið, kundi hann halda fram sum tænastumaður.

Í tí førinum endaði tað við, at ein tænastumaður fekk starvið.

- Men hevði tað enda við, at ein starvsmaður varð settur, hevði tað ført við sær, at førarin hjá hassjhundinum kundi farið í verkfall og so var tað eftirlitið við innflutninginum av narkotika, eisini fokið.

### Fríur innflutningur av narkotika

Formaðurin í Tænastumannafelag Føroya sigur, at heldur hendan gongdin fram, verður tað um nøkur ár, at allir tollararnir eru starvsmenn og so kann tolleftirlitið verða lagt lamið av verkfalli.

- Tað merkir, at so liggur alt landið púra nakið og víðopið fyri innflutningi av narkotika og øllum møguligum øðrum hugsandi og óhugsandi smugglaravørum.

Hann skilir ikki almenna politikkin á hesum øki. Hann heldur ikki, at myndugleikarnir kunnu vera so illa at sær komnir, at teir dúva upp á, at onkur annar starvsbólkur skal átaka sær arbeiðið hjá tollarunum, skuldi tað hent at teir fara í verkfall.

- Tað haldi eg er óhugsandi, tí tað hevur altíð verið eitt prinsipp, at ein starvsbólkur átekur sær ikki arbeiði, sum er rakt av verkfalli hjá einum øðrum starvsbólki, tí at bróta eitt verkfall er ímóti innastu prinsippunum í fakfelagsrørsluni.

### Óhugsandi

Meinhard Gaardlykke hevur ikki so nógvar viðmerkingar til, at endamálið at sleppa av við tann starvsbólkin, sum eitur tænastumenn.

- Men prísurin er, at so kunnu starvsbólkarnir fara í verkfall og leggja samfelagið lamið

Og hann heldur kortini, at tað eru ávísir bólkar í samfelagnum, sum eru í eini so serligari støðu, at teir eiga at vera tænastumenn.

Ein av hesum bólkum eru tollararnir, tí hann heldur, at tað átti at verið óhugsandi, at tolleftirlitið verður lagt lamið í ein um verkfalli.

Hann spyr um nakar kundi hugsa sær, at løgreglan fór í verkfall. Hann spyr eisini um nakar kundi hugsa sær at lent við flúgvara á flogvøllinum í Kastrup, men at ongir tollarar vóru tí teir vóru í verkfalli.

Meinhard Gaardlykke sigur, at Felag Tænastumanna Landsins fer nú at gera myndugleikarnar varugar við teirra sjónarmið og at teir stúra fyri gongdini.

- Tað stendur í Tænastumannalógini, at teir skulu verja landsins virði og orsøkin til, at vit hava havt tænastumenn, er, at hóast alt annað í landinum liggur lamið í verkfalli, er tað altíð eitt minstamát av tænastum í samfelagnum, sum kortini skulu virka fyri at alt ikki skal fara fyri skeyti.

- Og at gera tollarar til starvsmenn, er ein tanki, sum er okkum ógvuliga fjarur, leggur hann afturat.

Vit hava í fleiri dagar roynt at fáa eina viðmerking frá leiðsluni á Tolli & Skatti, men tað hevur ikki borið til

# Hevur nógv upp á samvitskuna

**Ein maður, sum er skuldsettur fyri at hava verið eftir einu konu í Timburhandlinum við øks, er nú leyslatin. Hann er eisini skuldsettur fyri fleiri innbrot og onnur lógarbrot**

LÓGARBROT
*Áki Bertholdsen*
*aki@sosialurin.fo*

Ein maður, sum er skuldsettur fyri at hava verið eftir eini konu við øks uppi í Timburhandlinum eina náttina nakað fyri jól, er nú latin leysur.

Hann hevur sitið í varðhaldi í fleiri vikur, men varð latin leysur í fyrradagin.

Men tað merkir ikki, at hann er sloppin, tí nú verður bíðað eftir, at eitt ákærurit kann skrivast og so verður hann stendur fyri rættin.

Hann er ikki skuldsettur fyri drápsroynd ella nakað líknandi, men fyri at hava hótt konuna við øks eftir at hon kom fram á hann eina náttina, hann hevði brotið inn í timburhandlinum.

Men hetta er verri enn so einasta lógarbrot, hann er skuldsettur fyri, tí sambært løgregluni hevur hann nógv upp á samvitskuna.

- Tilsamans er hann skuldsettur fyri 10 innbrot í Havnini og aðrastaðni, sigur Bergleif Brimvík, leiðari á kriminaldeildini hjá løgregluni.

Talan er fyri tað mesta um innbrot í kioskir seinastu mánaðirnar og onkuntíð lógu innbrotini dag um dag.

Tað mesta, hann er skuldsettur fyri at hava stolið, eru sigarettir og peningur, men talan er ikki um tær stóru upphæddirnar. Í tí eina førinum fekk hann 1500 krónur við sær og tað er ein tann størsti stuldurin. Sigarettirnar hava heldur ikki verið tær nógvu í tali, nakrar kartengur, ella nakrir pakkar. Í tí eina førinum fekk hann eisini 10 talutíðarkort við sær.

Í summum førum var hann ikki einsamallur um innbrotini.

Umframt hesi innbrotini, er maðurin eisini skuldsettur fyri at hava brotið inn í eina goymslu við dynamitti í summar, har hann stjól 25 kilo av dynamitti, sum hann goymdi uppi í Hoydølum.